**Góðan dagin øll somul og hjartaliga tillukku til okkum øll við Frúutrøð – 19. apríl 2023**

Tað skal vera gott at vera barn.

Barnaárini skulu vera fylt við spæli, gleði, vinum, nærleika og umsorgan. Hetta er grundleggjandi fyri øll børn. Tað er ongin munur á um man sum barn hevur serligar avbjóðingar ella ikki. Tað grundleggjandi við umsorgan, nærveru, tryggleika, vinum, spæli, gleði, frítíðarítrivi og hvat tað skal vera er nakað, sum øll børn tørva. Bara í ymiskum formum. Tí børn eru øll ymisk og tað er ikki altíð, at øll fáa glaði av somu tilboðum. Hetta er eisini galdandi fyri frítíðartilboð. Her mugu vit hava ymiskar loysnir, alt eftir hvør tørvurin hjá børnunum er.

Og tað hevur ikki altíð verið lætt at verið hvørki barn, ella familja, um tey vanligu tilboðini ikki eru hóskandi til tann tørvin, sum júst tykkara barn hevur. Tí var tað eisini ein stórur dagur í januar tá ið Frúutrøð lat upp. Tað

var ein stórur lætti hjá nógvum. Nógvar stúranir høvdu verið, og leingi hevði verið arbeitt við at fáa júst hetta frítíðartilboðið uppá pláss. Longu síðsta summar, gjørdi Sólvit Nolsøe avtalu við Tórshavnar kommuna um hølini. Ting taka tíð. Í januar fór frítíðartilboðið so smátt í gongd og nú í apríl hátíðarhalda vit at tað rættuliga virkar.

Eg fegnist stórliga saman við tykkum øllum, børnum, foreldrum og starvsfólkum, at vit nú eru komin so mikið langt, at frítíðartilboðið er veruleiki. Tað er ein stórur dagur, sum vit skulu hátíðarhalda.
16 børn eru í løtuni knýtt at tilboðnum, og lagt er upp til, at talið kann koma upp á 20. Hetta ger stóran mun hóast vit ikki eru komin á mál.

Við avtaluni um Frúutrøð ber til at savna ein stóran part av frítíðartilboðunum í miðstaðarøkinum undir somu lon. Á henda hátt, verður lættari at leggja arbeiðið skynsamt til rættis og soleiðis røkka út til fleiri familjur.

Frúutrøð er fyri børn, sum ganga í 3. flokki og upp eftir, og tey kunnu koma í tilboðið til tey eru 18 ár. Endamálið við nýggju frítíðarskipanini er at veita børnunum og teimum ungu ein innihaldsríkan dag við avbjóðingum, upplivingum, stuttleika og nærleika.

Málið er, at geva tí einstaka barninum og tí unga, umsorgan og stuðul, so tey kunnu kenna seg trygg og mennast. Støði verður tikið í tí einstaka við tí í huga, at øll eru serstøk og hava ymiskan tørv á at mennast sálarliga og likamliga.

Ætlanin við frítiðarskúlanum er, at her skulu øll hava tað gott, her skal vera pláss fyri menning  og í næstum fer klubbtilboði "Jollyklubb" at lata upp aftur.

Øll børn, eins og øll menniskju hava bæði tørv á, og møguleika fyri menning. Vit mennast bara ymiskt. Tí skulu vit hava ymisk frítíðartilboð, sum leggja dent á menningarmøguleikarnar hjá tí einstaka barninum.

Tað er eisini týdningarmikið fyri einstaka barnið, at vera í einum felagsskapi. At hava somu møguleikar sum onnur børn. Tørvir og ynskir eru tey somu, hóast øll ikki megna alt uppá sama máta. Men tað at kenna seg sum part av einum felagsskapi og at hoyra til, hevur týdning. Tað hevur eisini týdning fyri einstøku familjuna, at júst teirra barn fær menningarmøguleikar, verður inkluderað og kann hava vinir.

At foreldrini trygt kunnu fara til arbeiðis vitandi um at barnið er í góðum hondum. Tað er tykkara hjarta til geva starvsfólkunum í varðveitslu, meðan tit fara til arbeiðis. Trívist barnið so trívist familjan betri. Familja og barn eru ein eind.

Føroyar hava tikið undir við Barnarættindasáttmálanum sum áleggur okkum at liva upp til, at børn hava rætt til serliga umsorgan og stuðul, vernd og hjálp, og at vit sum samfelag skulu gera tað vit eru ment soleiðis, at barnið kann búgvast til sítt egna lív í samfelagnum gjøgnum virðir, sum

frælsi, tolsemi, frið og samanhald. Við Frúutrøð taka vit eitt fet rætta vegin at liva upp til Barnarættindasáttmálan, hóast vit eru vitandi um at onnur fet eisini eru at taka á leiðini.

Eg byrjaði við at siga, at tað skal vera gott at vera barn. Tað ivist eg ikki í dugnaligu starvsfólkini fara at gera sítt allarbesta til. Og í góðum samstarvið við foreldrini. Og tað skal vera gott hjá øllum børnum at vera barn. Øll hava vit teirra tilverurætt og øll eru virðismikil.

Sum Hans Andreas Djurhuus segði tað so vakurt tá ið grøsini á akrinum standa og ilskast á dáan, sum sær øðrvísi út enn hini grøsini

“Men dáin hann er í iva

Og hann hevur ymiskan lit

Eg havi væl loyvi at liva

Her líka so væl sum tit”

Her á Frúutrøð eru øll tey ymisku grøsini og blómurnar eitt vakurt blómutyssið av fittum børnum og ungum.

Hjartaliga tillukku við Frúutrøð og Harrans signing fyri virksemi tykkara.